# Heldur skúlamat enn fastfood

**Í Finnlandi er tað lógarfest, at skúlamaturin skal verða ókeypis, og at allir næmingar skulu fáa eina heita máltíð um dagin. Soleiðis er ikki í Føroyum. Tvær finsksvenskar gentur, sum hava verið í praktikk á Sosialinum í tvær vikur, hava vitjað á Handilsskúlanum í Marknagili og spurt nakrar næmingar um mat og matgóðsku**

MATUR

*Caroline Eriksson og Marika Hill, praktikantar*
*post@sosialurin.fo*

Høvdu skúlanæmingarnir etið meir skúlamat í Føroyum, um tað gjørdist væl bíligari, ella um tað var heilt ókeypis? Vit fóru ein túr niðan á Handilsskúlan á Marknagilsvegnum í Tórshavn, fyri at spyrja, hvat tey hildu um skúlamatin á skúlanum. Vit settu hesum fimm næmingunum fimm spurningar:

- *Hvat dámar tær skúlamatin?*
- *Etur tú skúlamatin, ella tekur tú mat við sjálv/ur?*
- *Átti skúlamaturin at verið ókeypis?*
- *Hvat átti at verið øðrvísi við matinum? Hví etur tú ikki matin?*
- *Er skúlamaturin sunnur/ósunnur?*



### Jan Scwartz Jacobsen, 17 ár:

**Tað velst um hvussu nógvan pening eg havi.**

**Eg eti á ymiskum støðum. Mær dámar stórt sæð alt.**

**Jú tað hevði verið gott, men hvussu skuldi tað ávirka skúlan?**

**Eg haldi, at maturin her er góður.**

**Eg haldi, at skúlamaturin er sunnur. Her er bæði kjøt og salat.**

### Katrina Leifsdóttir Johansen, 17 ár:



Í Skúlaheiminum er rættuliga góður og fjølbroyttur matur, men um tað hendir seg, at hann ikki er góður, so farið eg ein túr í SMS. Mær dámar ikki tað smurdi breyðið.

Eg eti mest í SMS, eg havi vanliga ikki mat við sjálv.

Ja! Men um maturin var ókeypis, so burdi hann verið sunnari.

Eg veit ikki. Mær dámar væl matin í SMS, og maturin í Skúlaheiminum er ikki altíð góður.

Bæði og. Um maturin er ósunnur, so kann ein altíð eta salat.



### Heri Müller, 17 ár:

Maturin í Skúlaheiminum er góður, men tað smurda breyðið er vánaligt.

Eg eti ofta úti í býnum, t.d. í SMS.

Maturin kundi verið bíligari.

Eg eti ikki skúlamatin her, tí hann er kaldur. Eg vil hava heitan mat. Eg vil ikki hava smurt breyð.

Nei, hann er ósunnur!

### Símun Rógvi Hansen, 20 ár:

Eg eti sum oftast í SMS. Viðhvørt kann maturin verða góður í Skúlaheiminum.

Nei, eg takið ikki mat við sjálvur.

Ja, tí maturin her er rættuliga dýrur.

Meiri fjølbroyttan mat, og eitt størri úrval í matarskránni.

Tá talan er um eplir og salat er tað sunnur matur, men samlað kundi tað verið sunnari.



### Beinta Andreasen, 18 ár:

Í Skúlaheiminum hava tey góðan mat, og hann er ikki so dýrur. Ein kann eta so nógv ein vil.

Eg eti skúlamatin, ella eti eg í SMS.

Ja, tað hevði verið betri og einfaldari.

Í skúlanum er tað kaldur matur, og mikromatur, sum er vánaligur. Tað smurda breyðið er rættuliga gott. Maturin á Skúlaheiminum er góður.

Eg haldi, at skúlamaturin onkuntíð er ósunnur, men salaturin er góður.

